


*Bremsurnar vóru ikki í lagi. Múrsteinarnir, sum førarin hevði lagt framman fyri hjólini, hildu ikki, og tí fór bilurin á rull. Lukkutíoð var eingin fyri*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Kundi volt stóran skaða

**Tað var við hepni heldur enn skili, at tað ikki stóðst mannskaði, tá ein bilur fór á rull í miðbýnum í Havn í dag**

FERÐSLUÓHAPP

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Tað var um hár gjørt, at eingin lá eftir á.

Soleiðis sigur eitt eygnavitni, sum Sosialurin hitti, beint eftir at ein vørubilur um middagsleitið í dag fór á rull oman gjøgnum Avhaldsbrekkuna í Havn.

Bilurin, ein vørubilur frá H. H. Trans, stóð og tók rusk frá Hotel Hafnia. Bremsurnar hava uttan iva ikki verið í lagi, tí bilførarin hevði lagt ein múrstein undir hvørt av forhjólunum.

Men múrsteinarnir megnaðu ikki at halda bilinum, sum fór á rull.

Bilurin rullaðin oman gjøgnum Avhaldsbrekkuna, yvir um gonguteigin millum Apotekið og Gamla Bókhandil, tvørtur um Áarvegin, gongubreytina og inn á Tinghúsvøllin, har hann steðgar tveir metrar framman fyri Rasmus Effersøe.

– Eg var jústin komin niðan brekkuna og inn á Gamla Apotekið, greiðir eygnavitnið frá.

– Meðan eg heingi jakkan frá mær, hoyri eg ræðuligan gang, tí bilurin ekur fram við vegginum á Gamla Apotekið, sigur vitnið.

Tá eygnavitnið hyggur út, sær hann standin - og tað rennir honum kalt eftir rygginum, tá hann hugsar um, at beint framman fyri hann gekk ein heilur skúlaflokkur tvørtur um gonguteigin – og hann torir ikki at hugsa tankan, hvat hevði hent, um tey vóru bara nøkur sekund seinni á ferð.

Av løgreglustøðini í Havn vilja teir ikki gera stórvegis viðmerkingar til málið. – Bilurin verður kannaður hjá Akstovuni, og fyrr enn hetta er gjørt, fáa vit ikki gjørt nakrar viðmerkingar, sigur vakthavandi.

# Bremsurnar SKULU sjálvandi rigga

**Sjálvandi skulu bremsurnar vera í lagi. Tað vóru tær ikki í hesum førinum, og tað er ikki nóg gott, staðfestir Magnus Magnussen á HH-Transport**

FERÐSLUÓHAPP

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er H.H. Trans, sum eigur flutningsbilin, sum mánadagin rullaði av Avhaldsbrekkuni við Húsabrúgv og omann á Tinghúsvøllin. Ein hending, sum væl kundi kostað fleiri mannalív, um illa vildi til.

Eftir øllum at døma hevur lastbilurin ikki havt nakra hondbremsu, tá teir hava tikið rusk frá Hotel Hafnia. Í øllum førum sóust tveir múrsteinar liggja við vegin, har bilurin hevur staðið, og uttan iva vóru hesir ætlaðir at halda bilinum, sum stóð í brekkuni.

Debes Petersen, stjóri á H. H. Trans var umborð á flogfari, tá vit um døgurðaleitið ringdu til felagið, men av skrivstovuni vóru boðini greið, at hetta ikki var nóg gott.

- Sjálvandi skulu bremsurnar á einum lastbili vera í lagi, tá koyrt verður. Á hesum bilinum skuldi hetta eisini verið gjørt, men vit kunnu bara staðfesta, at hetta ikki er gjørt. Og tað er absolutt ikki nóg gott, vóru einastu viðmerkingar, sum Magnus Magnussen vildi gera um hendingina.




*Bilurin hjá H. H. Trans verður í løtuni kannaður á Akstovuni í Havn. Fyrr enn frágreiðing fyriliggur, hevur løgreglan onga viðmerking*

*Mynd: Jonhard Hammer*